# Tíðindaleiðari nóg mikið í sær sjálvum

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður
www.keldu.com



**Munnu Jóhann Mortensen og eg eisini vera ósamdir um hesi tvey dømini av so mongum**

Havi í høvuðsheitum fyribils ikki so nógv at leggja afturat tí, sum eg skrivaði í m.a. Dimmalætting 5. mars um flytingina av SSL til Suðuroyar.

At tíðindaleiðari Útvarpsins, Jóhann Mortensen fór at geva mær rætt um manipulatión og subjektivan tíðindaflutning, hevði eg satt at siga ikki roknað við, og heldur ikki droymt um, tí fari eg bert at gera nakrar fáar viðmerkingar til orðini hjá honum fyri at vísa á hjálparloysi hjá okkara almenna Public Service stovni.

M.a sigur hann, at: "Eftir at hava lisið greinina hjá Jógvani við Keldu, havi eg gjørt mær tann ómak, at lurta eftir innsløgunum og lisið handritini frá tíðindaflutninginum" um SSL, "einki, sum bendir á, at tíðindaflutningurin er subjektivur". At lurta eftir sær sjálvum, helst ikki nóg kritiskt, sigur kanska nakað um sjálvkritikkin, ella ger tað?

Eg kom at hugsa um Mariu Antoinnette, sum sat á keisaraborgini, sum einki skilti av, at franska fólkið tørvaði føði. Hon skal hava sagt so mangt, m.a. "er einki breyð, so gev teimum køku".

Síðani staðfestir tíðindaleiðarin, at "samstundis sum vit hava fingið fleiri atfinningar seinastu tíðina um vantandi kritiskan tíðindaflutning...."

Sjálvt ikki hetta fær almenna Public Service stovnin at kvaklast við, men heldur gera roynd at brúka hetta helst móti fjøld av lurtarum, sum um hetta rættvísger stovnin.

**Tápuligt og provinsielt**

Síðani kemur hann við eini bæði tápuligari og provinsiellari útsøgn, at eg "helst ikki tori at kæra til fjølmiðlanevndina".

Lat meg gera vart við, at eg havi ongantíð kært til nakran kærustovn og vóni heldur ikki at eg fari at gera tað.

Líkt kundi verið til, at Jóhann Mortensen tykist halda, at kærustovnar eru koddi, sum almennir stovnar kunnu brúka og kalt og kyniskt siga, at fólk, sum hava nóg mikið at gera dagliga, bara kunnu brúka drúgva tíð til at leggja kæruskriv og hópin av skrivligum dømum til rættis fyri síðani at kæra. Nei, so einfalt er hetta ikki!

**Mong prógv**

Bara fyri at koma við einum lítlum dømi, nú hann dyrgir eftir próvtilfari, so hevði Útvarp Føroya í eini kvøldsending í eini yvirskrivt: "Jógvan við Keldu, landsstýrismaður er meldaður til politiið"!!

Eg vitsti einki um tað, men nú vísir tað seg, at ein persónur í síni extremismu fylgir Sjónvarps-tíðindasending, leypir úr sofuni, tí hann metir útlendskan borgara verða fyri ótrætti, hóast hann ikki hevði verið tað, og skrivar bræv til fútan. Nakað seinni avvísti fútin hetta.

Kundi hugsa mær at spurt Jóhann Mortensen, hevði ikki verið náturligt, at spurt mannin, sum var meldaður, áðrenn hetta av berum spenningi slapp út í luftina. Víðari kann sigast, at eg bað útvarpið um at fáa loyvi til at gera eina viðmerking, men hetta varð tagt burtur.

Jóhann Mortensen, er hetta ikki at manipulera og subjektivt gøða føroyingin við "spennandi" tíðindum?

Sjálvandi kunnu vit kæra sambært fjølmiðlaábyrgdarlógina, onnur mál kunnu kærast til Løgtingsins Umboðsmann, næsar kunnu býtast út til høgru og vinstru, men er tað so, at hetta skal vera mátin at halda stovnar okkara vælvirkandi, ríða vit lágt.

Til stuttleika, kann nevnast til seinast, at í samband við 8. mars-dagin vitsti útvarpið at siga, og hetta var umráðandi at fáa út júst nú, at árslønin hjá kvinnuligum lærara var 85% lægri enn hjá mannligum. T.v.s., at kvinnuligi lærarin fær 85% minni í løn fyri sama arbeiði. Hetta er skeivt, tí her er spurningurin, um kvinnuligi lærarin ikki av eini ella aðrari orsøk, arbeiðir færri tímar. Ein læraraløn er ein læraraløn fyri kall og konu.

Soleiðis fullu fyrstu tíðindini um hetta málið, og fyrstu tíðindini sita altíð best eftir. Tá tú sigur hetta, er tað at manipulera og afturat er hetta óetiskt, um so er, at tíðindaberin ikki hevur sett seg inn í málið.

Dømini tróta ikki um manipulatión, men nóg mikið fyri fyrst.

# Flaggið – sendistovur og fullveldið

JOHAN DAHL
løgtingsmaður



Nú hava loysingarmenn geberdað sær í fjølmiðlunum í vikur um flaggið á sendistovuni í Reykjavík - ja onkur tosar enntá um nýval orsakað av sama.

Somu menn sum uttan himpr í undanfarnu samgongu vóru við til at stovnseta føroysku sendistovurnar í Brússel og London – við veðraskjøldrinum á húsaveggjinum á donsku sendistovuni undir liðini á danska ríkisskjøldrinum og við merkinum flaggandi undir liðini á danska og grønlendska flagginum.

Hetta var sjálvandi gjørt á hendan hátt, tí man sá tað skilagóða í hesum og tí at hesar eru tær avtalaðu spælireglurnar millum londini.

Tann ekspertisan sum er á donsku sendistovuni og sum vit her kunnu gera brúk av og trekkja uppá er ikki til at undirmeta, - sum sendimenn okkara eisini hava lagt áherðslu á, tá vit hava vitja hesar.

At allir flokkar á tingið, inklusiv Tjóðveldisflokkurin, hava viljað somu loysn fyri sendistovu í Reykjavík, sum vit hava í London og Brússel, er sligið fast.

Millum annað søgdu umboð Tjóðveldisfloksins (Páll á Reynatúgvu og Karsten Hansen) í sambandi við fíggjarlógar minnilutauppskotið, at hesir, saman við Kára P. Højgaard, tóku undir við, at peningur verður játtaður til eina sendistovu í Reykjavík, sum skal hava somu tign sum sendistovurnar í Brússel og London.

Bæði politikarar og fjølmiðlar brúka misvísandi orð, tá teir tosað um sendistovur/ ambassadur og diplomatiskan status. Um ætlanin er at hava "eina føroyska "sendistovu" við føroyskum flaggi einans at veittra í Reykjavík", so tosa vit um umboðsstovu Føroya – ikki sendistovu við dipomatstatus. Eina sendistovu sum teirri vit høvdu í Aberdeen í mong harrans ár, væl umboðaðir av Sofusi Poulsen.

Hesa mettu vit ikki verða nóg "fína" longur og fluttu úr egnum hølum í Aberdeen inn á donsku sendistovuna í London – fyri at fáa diplomatstatus undir fullveldislandsstýrinum.

Har bleiv so at byrja vit bert flaggað við donskum flaggið – uttan stórvegis mótmælir frá fullveldismonnum.

Í dag veittrar merkið har lið um lið við dannebrog og veðraspjaldrið er á vegginum saman við danska ríkisspjaldrinum . Samstarvið á sendistovuni er fyrimyndarligt sambært føroyska og danska sendiharranum.

Vit eru í ríkisfelagsskapið og hava undir hesi vælvirkandi skipan avtalu við danska uttanríkisráðið um hvussu vit "spjaldra og flaggað" sum føroyska tjóðin umboða á donsku sendistovunum kring heimin. Hetta er púra greitt staðfest mannagongd í avtalu okkara.

So leingi sum Føroya fólk velur at verða undir hesum vælvirkandi felagsskapi saman við Danmark og Grønlandi, so má loysingarvongurin, antin hann vil tað ella ikki, "dáma luktin í bakarínum".

Teir kundu, sum øll vita, havt tikið kjansin í 2001 og tikið fólkaatkvøðuna um fullveldið ella ríkisfelagsskap , - MEN teir tordu ikki at gjøgnumføra hesa, tá tað kom til skarpskeringar í 2001.

At sláa uppá stórutrummmu uttan ábyrgd, er og verður teirra spjaldramerki. Tað haldi eg at flestu føroyingar hava sæð í eyguni.

# Arbeiðsmegi er at finna

HELGI ABRAHAMSEN



Landsbankin almannakunngjørdi fyri nøkrum vikum síðani eina búskaparmeting fyri komandi árið. Bankin sigur í metingini, at búskaparvøksturin sum vit sóu í fjør, fer at halda fram í 2007, men vøksturin verður tó nakað minni enn í fjør. Størsta orsøkin til avmarkaða vøksturin er, at vit mangla arbeiðsmegi í landinum.

Hetta má sigast at vera ein positivur trupulleiki, tí tað at mangla arbeiðsmegi er tað sama sum einki arbeiðsloysi at hava. Men hvussu kunnu vit fáa fatur á meira arbeiðsmegi, tá øll hava arbeiði?

**Longri arbeiðsdag**

Ein møguleiki er, at vit bjóða verandi arbeiðsfólki at arbeiða nakrar tímar fleiri um vikuna, um tey hava hug til tað. Har hevur sitandi landsstýri slóðað væl fyri við sínum skattapolitikki, tí nú loysir tað seg at arbeiða longri, uttan at økta inntøkan verður uppetin í skatti.

**Útlendsk arbeiðsmegi**

Ein annar møguleiki er, at vit fáa fatur á útlendskari arbeiðsmegi, men tann møguleikan eru fakfeløgini ikki so fegin um, og vilja hava reglurnar hesum viðvíkjandi broyttar.

Men tað eru ikki bara fremmandafólk at finna uttan fyri landoddarnar. Har eru eisini føroyingar í stórum tali, og fleiri av teimum hava neyvan nakað ímóti at flyta heim aftur, um so er, at vit kunnu bjóða teimum trygg kor, arbeiði og almennar tænastur.

Vit skulu minnast til, at altjóðagerðin hevur tað við sær, at um vit ikki fáa arbeiðsmegi til landið, so kunnu vit rokna við, at framleiðslan flytur av landinum, aftaná arbeiðsmegini.

**Longri arbeiðslív**

Triði møguleikin er, at fólk sum fylla 67 ár fáa møguleikan at halda fram á arbeiðsmarknaðinum, um tey hava hug til tað. Sjálvsagt skal hetta vera eitt frítt val, har fólk sjálvi taka støðu til, um tey velja at leggja frá sær, ella um tey heldur vilja halda fram á arbeiðsmarknaðinum. Men hetta krevur, at tað fíggjarliga loysir seg at arbeiða. Tað nyttar einki, at fólk fáa tilboð um at arbeiða, um tað loysir seg betur at sita heima.

Her eru nevndir tríggir møguleikar, sum kunnu brúkast, um málið er at økja um arbeiðsmegina í Føroyum. So er tað ein annar spurningur, um politikararnir halda tað vera rætt í verandi støðu at leita eftir meira arbeiðsmegi ella ikki. Men arbeiðsmegin er at finna.

# Føroya fólk hevur tignina!

HANNA JENSEN

Sannleikin er illa lýddur. Hann er tað einasta, sum kann fáa eitt sindur av røring í ta annars rættiliga tomu ting- og landsstýrismanningina, vit hava.

Uttan at taka støðu til maktspælið ímillum politikararnar, so er tað púra greitt, at Poul Michelsen er tann einasti í Fólkaflokinum á tingi, sum umboðar veruligan fólkaflokspolitikk í tjóðskaparmálinum. Hann sigur tað, sum øll vita, at einasta endamálið hjá hesari samgonguni er at halda tjóðskaparligu kreftunum aftur. So einfalt kann tað sigast. Soleiðis skal henda 4-ára oyðimarkargongdin skiljast.Vónandi kemur ikki eitt 0 afturat!

Samgonguleiðarin – okkara núverandi løgmaður - er ein danskur tjóðskaparmaður. Hann brennur fyri at tekkjast donsku myndugleikunum. "Vit kunnu ikki... vit megna ikki...donsku myndugleikarnir siga... o.s.fr." Hann vil so fegin flagga við Merkinum, men...men..., og aftur men... Poul Mohr (liggur tað til navnið Poul?) segði tað so beinrakið: "Um hann er ein maður, so...".

"Primitivt", helt onkur um tað, Poul Mohr segði. Men tað sær út til, at einasti máti at fáa fólk at lurta og rakna við er við at kalla tingini við navni. Og nær er tað vorðið primvitivt at siga sannleikan? Tá kemur eldur í tað gamla hoyggið. Um løgmaður er ein maður (les statsmaður!), so tekur hann stig fyri tað føroyska fólkið í staðin fyri at goyma seg aftan fyri okkurt nýliga undirskrivað skjal. **Ein sáttmáli, har annar parturin missir síni rættindi til fyrimuns fyri hin partin, er ikki verdur at halda fast við, men eigur at verða uppsagdur í stundini. Hetta er m.a. galdandi fyri skjøl, lógir, ríkislógartilmæli og onnur misfostur hendan samgongan hevur megnað at føtt.**

Harra løgmaður, virð tað fólk, tú ert settur at umsita rættindi og ognir fyri! Vís tí tað tign, tað er vert og hevur uppiborið eftir so drúgva tíð undir mannminkandi korum! Føroya fólk **hevur** tignina at umboða seg sjálvt. Tað er tað einasta fólkið í heiminum, sum **kann** gera tað. Og er tað fullveldi, sum skal til (og tað er tað!!), ja so lat okkum fáa føroyskt fullveldi í Føroyum! Tástani fær løgmansembætið ta tign, tað eigur at hava. Tástani er tað nakað veruligt, at vera Føroya løgmaður.

hanna10@post.olivant.fo